## Milliónirnir ikki funnir

Teir hepnu lotto-vinnararnir eru framvegis ikki allir funnir. Bert tveir av teimum í alt tíggu vinnarunum hava gjørt vart við seg. Vinningurin lá yvir tær 9 milliónirnar í part, so hevur tú keypt ein lotto-seðil um vikuskiftið, kann tað møguliga loysa seg at kanna seðilin enn einaferð.



## Við Skúvadal til Mykinesar

Um viðrar, fer útferðafelagið Skúvadal leygardagin at gera útferð til Mykinesar. Útferðin verður kl.17 leygardagin, og verður farið við bátinum Froyi. Frá Skúvadal verður frætt, at túrurin er serliga ætlaður suðuroyingum, og at ein staðkendur ferðaleiðari verður við á útferðini.

# Oljufeløgini boðin til fundar í august

**Fyri fyrstu ferð síðani leitiloyvi vórðu latin í 2000 fara føroyskir myndugleikar nú at umrøða treytirnar við oljufeløgini**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Fyrstu leitiloyvini á føroyska landgrunninum vórðu latin í ár 2000 tvs. fyri góðum seks árum síðani. ì vetur verður 3. loyvisrundan latin upp, og í hesum sambandi hevur Jarðfeingi boðsent øllum loyvishavarum tvs. oljufeløgum, sum hava loyvi at bora eftir olju og gassi á landgrunninum, til fundar í Havn. -Hetta verður gjørt tí vit vilja hava at vita frá oljufeløgunum, hvussu skipanin við treytum og reglum hevur virkað øll hesi árini, og um ynski eru um broytingar og ábøtur sigur Sigurð í Jákupsstovu.

Jarðfeingi arbeiðir annars við at fáa 3. leitiumfar uppá pláss. Øki eru útpeikað og skulu síðani vera fundir við ymsar stovnar, sum vara av eitt nú umhvørvinum, fiskastovnunum osfr. Tá alt hetta arbeiðið er liðugt verður so uppskot til 3. útbjóðingina lagt fyri løgtingið. Eftir ætlanini verða loyvi latin oljufeløgunum um nýggjarsleitið.



*Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi*

Sigurð í Jákupsstovu sigur, at føroyskir oljumyndugleikar eins væl og oljufeløgini bíða spentir eftir at frætta úrslitið frá stóru boriverkætlanini beint hinumegin markið, har Chevron, Statoil, OMV og DONG eru í ferð við at bora næsta av trimum avmarkingar- og metingarbrunnum á Rosebank/Lochnagar oljukelduni, sum varð funnin nøkur ár herfyri. Tá fyrsti brunnurin varð boraður sá tað gott út. Tað er pallurin Transocean Rather, sum borar hesar brunnarnar.

# Shell selur út í Føroyum

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Heimsins størsta oljufelag, Shell, sum er millum tey mest virknu í oljuleitingini við Føroyar, er farið at selja út av sínum loyvum á føroyska landgrunninum, vestan fyri Hetland og í Norðsjónum veit Sosialurin frá keldum í oljuvinnuni. Shell er millum tey feløgini, sum hevur lut í flest loyvum í hesum partinum av heiminum. Við Føroyar hevur Shell lut í ikki færri enn trimum ymsum loyvum, teirra millum Brugduni, sum varð borað í fjør og í William, sum verður borað í heyst. Um hetta er ein ábending um, at felagið ikki metir eitt nú leiting á Atlantsmótinum nóg áhugaverda longur er ilt at siga, men tað nýtist ikki at vera so. Tað er ikki óvanligt, at oljufeløg selja út av sínum loyvum fyri at spjaða váðan ella tí tey leggja seg eftir eini nýggjari strategi. Sum skilst hevur felagið sett nøkur av loyvum sínum til sølu á oljumarknaðinum. Hetta veit blaðið frá eitt nú oljufeløgum, sum eru virkin vestan fyri Hetland og við Føroyar. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa nakra viðmerking frá Shell. Frá Jarðfeingi fáa vit tað svar, at tey geva ikki upplýsingar um, hvat oljufeløgini fyritaka sær. Tað mugu vit fáa frá feløgunum sjálvum.

Shell er sum sagt við í Williambrunninum, sum skal borast í heyst.



## FøroyaKolvetni bora í Norðsjónum

**Avtala undirskrivað um at bora »Breagh« (Breya) metingarbrunnin í Norðsjónum**

TÍÐINDASKRIV

Faroe Petroleum boðar í tíðindaskrivi frá, at avtala er undirskrivað við "The AGR Group" um at bora Breagh metingarbrunnin á blokki 42/13 í syðra parti av Norðsjónum.

Canadiska oljufelagið Sterling Recources er fyristøðufelag á blokkinum 42/13. Fyrsti brunnurin varð boraður longu í 1997 og ein gasskelda varð funnin; nú skal so ein metingarbrunnur borast. Faroe Petroleum eigur 10% av loyvinum.

Breagh metingarbrunnurin verður væntandi boraður í september mánaða í ár, og tað verður ENSCO 85 boripallurin sum skal bora brunnin, hesin boripallur hevur góðar og drúgvar royndir í syðra parti av Norðsjónum.